

*Offshore Europe 2005 verður í ár hildin í Aberdeen í døgunum 6. - 9. September. Millum tey mongu londini, sum teljast við á messuni, verða eisini Føroyar*

# Føroyar við á altjóða oljumessu

OLJUMESSA
*Jan Müller*

Árliga og afturvendandi risastóra oljumessan Offshore Europe 2005 verður í ár hildin í Aberdeen í døgunum 6. - 9. September. Millum tey mongu londini, sum teljast við á messuni, verða eisini Føroyar.

Føroyska útrásin til framsýningina verður tó ikki so stór í ár. Har vera m.a. Atlantic Airways, Beras, PAM Offshore, Thor Offshore, Syntesa, Virkisráðgeving, Vagar Floghavn, Tórshavnar Havn, Runavíkar Havn og Faroe Ship. Herumframt verða Oljuvinnufelagið, Oljufyrisitingin og Menningarstovan við, og SINDRI fer at gera vart við sítt arbeiði á framsýningini. Vónin hevði boðað frá luttøku, men mátti av øðrum uppgávum melda avboð.

Á Offshore Europe 2003 varð á føroyska básinum burturlutað ferð og atgongumerki til fótbóltsdyst Føroyar-Skotland. Hetta dró mong fólk til básin. Á oljumessuni hesaferð er so ætlanin at luta atgongumerki til Offshore Faroes 2006 við ferð og gisting út, umframt kanska nøkur atgongumerki til ráðstevnuna. Tann ráðstevnan verður í seinnu helvt av januar.

Magni Arge varin optimistur:

# Føroyingar mugu vísa flaggið

OLJUMESSA Í ABERDEEN
*Jan Müller*

Føroyingar verða aftur við á altjóða oljuframsýning og oljuráðstevnu í ár, sum verður hildin annaðhvørt ár í Stavanger og í Aberdeen. Hesaferð er oljuframsýningin í Aberdeen í døgunum 6. - 9. september. Hóast føroyingar hava verið eitt sindur varnir seinastu árini við ikki at taka munnin ov fullan til slík oljutreff, nú tað ikki hevur verið so nógv virksemi á landgrunninum, so vilja myndugleikar og vinnan kortini halda flagginum so mikið høgt, at vit eru við.

Magni Arge, stjóri í Atlantsflogi og formaður í Oljuvinnufelagnum heldur tað vera rætt, at føroyingar eru við, hóast vit ikki enn hava nakrar stórar olju- ella gasskeldur at vísa á. Hann er fegin um samstarsvið, sum hevur verið millum Oljuvinnufelagið, Menningarstovuna og so Oljufyrisitingina um slíka luttøku. – Eg haldi tað er umráðandi at vera við og vísa flaggið og ikki minst nú, tí tað er kanska orsøk til at vera varin optimistur. Tað er so eingin orsøk til at sleppa endanum nú, tá vit hava hingið í so leingi.




*– Eg haldi tað er umráðandi at vera við og vísa flaggið og ikki minst nú, tí tað er kanska orsøk til at vera varin optimistur*

### Offshore Faroes í januar

Magni Arge sigur annars, at tey fara sum higartil at skipa fyri tí føroysku oljumessuni "Offshore Faroes" eisini eins og undanfarin ár. Hon verður hesferð aftur í seinnu helvt av januar og viðgongur hann, at tað verða tær spennandi boringarnar á Føroyaleiðini og Atlantsmótinum sum heild, sum fara at vera frammarlaga á dagsskránni. Hann vónar eisini, at stóra virksemið nettupp í 2006 fer at fáa eisini nógvar útlendingar til Føroya á hesa føroysku oljuráðstevnuna tíðliga í næsta ár. Hann minnir í hesum sambandi á tær spennandi boringarnar, sum eru fráboðaðar av bæði Statoil og Chevron bæði á føroyskum og bretskum øki. – Hesar útmeldingar, sum vit hava sæð umrøddar í miðlum í seinastuni bera boð um, at vit møguliga og vónandi ganga eini bjartari og spennandi tíð á møti hvat viðvíkur oljuleiting og vónandi eisini oljuframleiðslu. Helst fara oljuprísir og avleiðingarnar av teimum eisini at vera ein týðandi partur av tí føroysku oljumessuni í januar. Magni Arge vónar, at útlendingar, sum vitja føroyska básin í Aberdeen í næstum, fara at fáa eyguni upp fyri tí áhugaverdu framtíð, sum Atlantsmótið hevur at bjóða á oljuøkinum, og heldur hann, at "Offshore Faroes" oljuráðstevnan verður eitt gott høvi at fáa innlit í hesa framtíð. – Útlendingar við áhuga fyri oljuævintýrinum í Norðuratlantshavi skulu vera so hjartaliga vælkomnir til Føroyar í januar at hoyra um møguleikar her og samtíðis njóta føroysku náttúruna og gestablídni her.